# 2008 November



## Heðin Mortensen í serflokki

Í november vóru føroyingar á kommuvalið, og sum vera man var spenningurin stórur um úrslitið. Kanska mest sermerkta úrslitið var, at borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, fekk heilar 2200 persónligar atkvøður. Hetta setti hann í so sterka støðu, at hann kundi halda sum borgarstjóri, hóast aðrir møguleikar vóru uppi og vendu.

Í Klaksvíkar var støðan ein heilt onnur, tí har misti Steinbjørn O. Jacobsen nógvar atkvøður, og tað kostaði honum eisini borgarstjórasessin. Nýggjur borgarstjóri verður Gunvá við Keldu.





# Obama broytti USA

**- Er tað nakar, sum framvegis ivast í, um USA er landið, har alt letur seg gera, so hava tit svarið her, segði Barrack Obama, sum varð valdur til nýggjan forseta í USA**

Tann næsti forsetin í USA eitur Barrack Obama. Hann er 47 ára gamal, og hann er littur. Hann vann ein sannførandi sigur á John McCain á forsetavalinum í USA.

- Er tað nakar, sum framvegis ivast í, um USA er landið, har alt letur seg gera, so hava tit svarið her, segði Barrack Obama í takkarrøðuni fyri umleið 75.000 innbodnum áhoyrarum í Grant Park í Chicago.

Hann ásannaði, at hann hevur stórar avbjóðingar fyri framman, og at gøtan fyri framman er brøtt, nú USA er í einari svárari støðu fíggjarliga. Men hann vissaði samstundis áhoyrararnar um, at hann hevur góðar vónir um, at landið kemur burtur úr kreppuni.

- Yes, we can, svaraði mannamúgvan við orðunum, sum Obama sjálvur hevur brúkt sum slagorð undir valstríðnum.

Sjálvur vendi hann sær til teirra, sum ikki høvdu atkvøtt fyri sær og segði, at hann vil eisini hoyra frá teimum, sama hvør flokslíturin er.

Sum vera man takkaði Barrack Obama eisini konuni Michelle fyri tann stuðul, sum hon hevur veitt honum undir tí langa valstríðnum.

- Hon hevur verið mín besti vinur tey seinastu 16 árini. Hon er kletturin í húskinum og verður næsta forsetafrúan í USA, segði hann. Síðani nevndi hann tær báðar døturnar, sum hann umrøddi sum sínar eygnasteinar, og hann skoytti uppí, at tær tær skulu fáa ein hundahvølp við sær, tá húskið flytir inn í Hvítu Húsini

### Fólkaræðið sigraði

Millum tey, sum fegnaðu um úrslitið á forsetavalinum, var oddagreinaskrivarin í Sosialinum.

- Obama er tí sjálv ímyndin uppá USA, sum landið, har dreymar framvegis kunnu gerast veruleiki. Men hann er eisini ímyndin um døkku síðurnar í einum landi, har ójavni, rasuskilnaður og samfelagslig líkasæla hava eyðkent gerandisdagin í øldir, skrivaði Sosialurin í oddagrein dagin eftir valið.

- Ásannast má, at valsigur Obamas hevur prógvað, at demokrati USA hevur staðið royndina, og at USA framvegis virkar sum eitt sterkt og opið fólkaræði, hóast hetta fólkaræði ikki hevur havt tað so gott sum ynskiligt er hesi seinastu átta árini.

- Nú verður Obama so forseti, og vónirnar og forvæntanin eru ómetaligar. Hann fer ivaleyst at megna uppgávuna. Hann hevur savnað bestu heilarnar í USA rundan um seg, álitið er stórt innan- so væl sum uttanlanda, so alt bendir á ljósari tíðir fyri USA og fyri allan heimin, skrivaði Sosialurin.

» **Høvdu vit, tá fiskiskapurin minkaði, minka talið av fólki á sjónum, og sett fleiri at byggja hús. So høvdu vit ongantíð verið komin í støðuna, sum hon er nú.**

Kári Petersen, búskaparfrøðingur og løgtingsmaður

» **Hevði mann hugt at tímalønini, og hvussu nógvar tímar eg arbeiði, hevði mann sæð, at eg neyvan vinni meiri pening enn ein vanligur arbeiðari, og tað meti eg ikki vera hóskandi.**

Elin Heinesen, stjóri á SamVit

## Landið bjargaði Norrønu

Smyril Line kom í slíkt ódnarveður, at sagt varð, at um landið ikki spýtti pengar í felagið, fór tað á heysin og Norrøna kom ongantíð aftur til Føroya. ABC-landsstýrið gjørdi av at fara inn í Smyril Line við almennum pengum, hóast orðaskiftið var hart, og nógvir serfrøðingar mæltu harðliga frá at gera tað. Úrslitið var, at landskassin gjørdist høvuðspartaeigari í Smyril Line, og felagið varð bjargað undan húsagangi.

Formaðurin fyri Búskaparráðið, Jørn Astrup Hansen, førdi fram, at landið við hesum hevði tikið serliga ábyrgd á seg og kemur at hefta fyri framtíðar tap hjá Smyril Line.

## Grind er ikki mannaføði



**Tað kom næstan sum ein skelkur, hóast onkur mundi hava ein illgruna. Grind og spik eru so dálkað, at tey eiga ikki at verða brúkt sum mannaføði. Tað var tilráðingin frá landslæknanum og granskaranum Pál Weihe. Kyksilvur og onnur evni gera tvøstið og spikið so vandamikil fyri fólk, at eingin eigur at smakka tað,**

## Kreppan vísir seg

Uppsagnir í stórum á fyritøkum og á stovnum, fiskavirki í trupulleikum, sethússølan kavar, bilasølan næsta steðgar upp, og fólk hava minni av pengum. Fíggjarkreppan, sum gjørdist ein búskaparkreppa hevur fingið avleiðingar fyri samfelag og fólk. Búskaparfrøðingar rokna við, at 2009 kann gerast eitt trupult ár hjá bæði privatfólki, fyritøkum og almennum myndugleikum. Landsstýrið roynir við stórum halli á fíggjarlógini at uppviga eitt sindur fyri niðurgongdini, sum annars er í samfelagnum.